

*Foreldrini hjá Onnu, Annika og Jóhannes Gøthe*



*Foreldrini hjá John, Johannes og Malena Lassen*



*Jóan Magnus, beiggi Onnu, gekk burtur 11. apríl 1945 við danska skipinum Panama, har hann var fjarritari umborð. Hann gjørdist bert 34 ára gamal*

nógv at arbeiða. Og tað arbeiði sum var, máttu giftir menn hava.

John vildi fegin útvega sær kunnleika. So hann fór á háskúla ein vetur. Annars var eisini motorskúli í bygdini, sum Johan í Grótinum skipaði fyri. Her gekk John eisini ein vetur fyri ikki at ganga fyri einki.

## Til Grønlands við "Ekliptiku"

Men loksins fór John til skips í 1934, tá hann var 16 ára gamal. Hann fór til Grønlands við "Ekliptiku" hjá Jákup Heinesen. Her var John við í fleiri ár. Skipið varð tá í tíðini roknað sum eitt tað frægasta í flotanum.

Tá hevði Eklipitika einki stýrhús. Í ivalíkindum stóðu tveir menn bundnir við róðrið. Eina ferð fingu teir ein stóran sjógv. Tá avtornaði sótu báðir menninir á dekkinum við rattinum ímillum sín, allar snældurnar vóru brotnaðar. Tað eydnaðist at fáa eina stóra rørtong um møtrikkin í hjartanum, har rattið hevði sitið, og at bendsla hana fasta, so hon kundi brúkast at stýra við.

So varð lagt til at repa. Sjógvurin var so ringur, at reptaljuløbarin varð tikin niður í lugarið, so at repið bleiv niðurhálað í lugarinum. Teir menn, sum vóru á dekkinum, vóru allir í línu.

John hevur hoyrt nógv um sjógv, og helt at hetta ikki var so óvanligt. Men tílíkt hevur hann ikki verið við til síðan.

## Royndartúrurin til Eysturgrønlands

Tá teir komu aftur vártúrin í 1935 vóru teir liggjandi við fiskinum. Skiparin hevði ánilsi av, at prísurin sum frá leið fór upp. Carl á Lag keypti loksins fiskin fyri 36 oy/kg, sum var besti prísur tað árið.

Seinni í 1935 fóru teir til Eysturgrønlands. Hetta var ein serligur rannsóknartúrur.

Eysturgrønland var ein heilt ókendur heimur tá í tíðini. Løgtingið samtykti í 1935 at stuðla eini kanningarferð við kr. 15.000, og var hetta nógvur peningur tá.

Ekliptika var væl egnað til endamálið. Hon var uppá seg nýggj, bygd í 1922 í Noregi og serstakliga ætlað til íshavsferðir. Hon hevði motor og hon hevði radiosendara. Skipið hevur verið sera framkomið eftir tátíðini.

Teir fóru avstað 4. juli 1935, men illa gekk. Fyri tað fyrsta var lítið av fiski at fáa. Tað var bert onkran dag, at teir fingu nakað av fiski, men tá forðaði ísurin. Fleiri dagar fingu teir bert einstakar fiskar.

Men so hendi tað, at meslingar fóru at ganga umborð. Og hetta var ikki gamansleikur. Meslingar kundu vera ein deyðilig sjúka hjá vaksnum fólki. Men John slapp kortini væl. Hann kláraði at vera úr koyggjuni hóast sjúkuna. Teir fóru tískil inn í Íslandi, til sjúkan var avhasað, og so fóru teir avstað aftur. Men framvegis bar lítið til, og samlaða veiðan fyri túrin gjørdist bert 21 skippund.

Í 1936 var nakað av fiski, men í 1937 gekk illa í Grønlandi. Tað var nógv sjúka umborð. Onkur av manningini hevði tuberklar, og hetta merkti, at allir fingu smittuna. Hetta var vanligt tá og var eisini orsøkin til tvungnu tuberklakanningina av fiskimonnum.

Í 1937 vóru teir eisini á Suðurlandinum, og í bókini um Ekliptiku verður greitt frá úrtøkuni hjá hvørjum manni. Hendan túrin forvann John 118 kr!

Í 1938 fekk Ekliptika nýggjan motor. Teir høvdu ein Tuxham motor, 1 sylindara, sum var 48 hestar. Nú fingu teir ein sum var 86 hestar við 2 sylindarum. Hetta var eitt stórt framstig!

Annars letur John at, at Jákup Heinesen var góður at vera saman við. Allir høvdu teir respekt fyri honum.

## Kvett á sildaveiðu

Á várið 1939 var Ekliptika leigað at fara við gørnum undir Íslandi. Um summarið fóru teir á sild við nót.

Tá hevði John fortjent so nógv, at hann fór at læra til skipara í Havn veturin 1939/40.

Í 1940 fór John aftur við Ekliptiku. Tað var nógvur fiskur, prísurin var farin upp aftur. Teir fóru so á sild um summarið. Teir landaðu á Hjaltoyri til mjøl- og kanska serliga lýsiframleiðslu. Skipið tók eini 1200 mál, sum hvørt var 120 kg. tá var alt fult uppundir lúnningina. Teir fortjentu heilt væl.

John minnist einaferð teir lógu á Kappagrunninum. Teir komu framá eina stóra sildatorvu. "Havgásin" kom at biðja sild til agn. Skiparin bað teir á "Havgásini" steðga, meðan teir kastaðu. Nógv var í, so tað var so tungt at draga. So komu teir av Havgásini umborð at hjálpa. Tað ráddi um at fáa drigið skjótt, tí um sildin doyði, sakk hon, og so kundi alt fara fyri skjeyti. Men væl gekk, og "Havgásin" fekk so mikið av agni sum teir vildu.

Úrtøkan úr einum slíkum kasti var 1.200 kr. Hetta mátti ljóða sum eitt ævintýr, tí bert fá ár frammanundan var ein ársløn hjá fiskimanni 600 kr.

## Flaggið

John greiðir soleiðis frá, hvussu hann minnist byrjanina av krígnum: "Í 1939 fyrst í september brast kríggið á. Vit vóru tá á sildaveiðu undir Íslandi. Boð komu tá til øll skip um at mála tjóðarmerkið á skipssíðuna. Hjá okkum gjørdist tað danska flaggið. Vit málaðu, so frægt sum vit dugdu.

Á várið 1940 skuldi sum vant farast á Suðurlandið við toskagørnum. Tá varð flaggið málað um aftur av fakfólki. Vit so avstað og tað gekk væl. 9. apríl verður Danmark hersett av týskarum og beint eftir Føroyar av bretum, og vit sigldu undir donskum flaggi. Tá leið túrinum so væl. Vit skuldu inn á Reykjavík, áðrenn vit fóru heim. Tá ið vit koma inn hagar, sóu vit fleiri herskip og fleiri flogfør. Tað tyktist, sum teir vóru serliga áhugaðir í okkum, og var hetta orsakað av danska flagginum.

Onnur skip, sum høvdu verið undir Íslandi, og sum vóru á veg heim, vórðu støðgað av bretum og beind inn til Reykjavíkar at skifta flagg. Vit høvdu hoyrt, at Merkið var góðkent sum tjóðarflagg. Út fyri Reykjavík lógu nøkur donsk og norsk skip, sum bretar høvdu tikið inn til Reykjavíkar. Har inni lógu fleiri føroysk skip. Millum onnur Rókur hjá Skipafelagnum. Hetta var eitt lítið træskip, sum valla førdi 100 tons. Tað var komið til Íslands eftir seteplum. Tá kríggið brast á fóru menn at velta. Vanligt var at fáa set og tøð úr Danmark, men nú var sambandið jú slitið. Hetta man hava verið fyrstu ferð Ísland útflutti eplir.

Skipið hjá okkum varð kannað. Serligur dentur varð lagdur á, at flaggið mátti skiftast út. So vit máttu mála útyvir danska flaggið á skipssíðuni. Vit fingu máling, so hetta gekk gott.

Tað gekk verri at fáa eitt føroyskt flagg. Teir áttu ikki nakran passandi hvítan dúk. Men at enda fingu vit eitt flagg frá onkrum øðrum.

Nú var einki regluligt samband millum Ísland og Føroyar. Skipini, serliga tey á Tvøroyri, lógu klár at fara á Eysturlandið. Tey bíðaðu eftir sild, sum skuldi koma úr Íslandi við Drotningini. Men hon var løgd.

Vit høvdu ein lítlan banjara tóman eftir í lastini. Hann varð so fyltur við sild til Mortensen á Tvøroyri. Vit komu so á Tvøroyri við sildini. Tá var lagið á reiðaranum Gudmundi gott. Men tá var bara eitt skip eftir á Tvøroyri. Hini vóru farin til Havnar at bíða. Tey máttu so suður aftur eftir agninum, áðrenn tey sluppu avstað.

## Økslin bjargaði lívinum

Í 1941 vóru skipini rættuliga farin at sigla niður við fiski. Hetta gav nógvan pening, men var sera vandamikið. Henda sigling kravdi minni manning. Skiparin hevði ætlað, at John skuldi við. Men hjá honum fór økslin úr lið, og hetta vildi so undir øllum umstøðum forðað John í at fara við. Og tað vildi so illa til, at fyrsta túrin hjá Ekliptiku hvørva teir á veg úr Aberdeen.

Komin fyri seg aftur fór John at rógva út við norskum báti, sum kallaðist "Ulf", sum var eina av norsku fiskibátunum, sum rýmdu undan týskarum undir krígnum.

## Fór við trolara

Men so slapp John við (fyrsta) Skálabergi.